

*Leygardagin verður Sámal Jacobsen 75 ár*

# Sámal Jacobsen 75 ár

Tann 15. september verður Sámal Jacobsen í Havn 75 ár.

Tað eru fáir, sum í sama mun sum Sámal, kunnu sigast at vera eitt barn av havinum.

Pápi hansara var Sámal Jacobsen í Søldarfirði, sum var skipari á Immanuel, tá ið hon gekk burtur við 19 monnum á vári 1932. Í vár greiddu vit frá hesi søguni og frá minningarhaldinum í Søldarfirði í samband við, at 75 ár vóru liðin síðan hesa syrgiligu hending. At Sámal nú fyllir 75 ár merkir eisini, at hann er føddur faðirleysur.

Helena og Sámal áttu frammanundan Eiler, og nú sat Helena eftir við tveimum smáum synum.

Nøkur ár seinni giftist Helena til Skálavíkar við Niels Nicodemussen, sum eisini var fiskimaður alla sína virknu tíð. Sámal vaks upp í eini fiskimannabygd, og hjá honum var leiðin til sjós sjálvsøgd, so skjótt hann hevði rokkið tann aldurin.

Millum skipini, sum Sámal var við sum ungur, var Norðfarið, sum hann fór við í 1950 saman við fleiri øðrum ungum skálvíkingum, og var Eil er beiggi hansara millum hesar.

Tá var Norðfarið ein av teimum góðu kjansunum at fáa. Norðfarið var annars eitt av teimum skipum, sum fingu skarpan gang í tí illveðrinum, sum beindi fyri Immanuel og Lauru.

Seinni fór Sámal á sjómansskúla og fekk prógv. Hann kom at sigla sum skipari og yvirmaður restina av sínum sjólívi.

Hann var millum annað skipari á Havsøka, sum var eitt av teimum nógvu stállínuskipunum, sum komu frá seinast í 50-unum og fram í 60-ini. Mitt í 60-unum var Sámal saman við Eileri og øðrum góðum monnum um at byggja Ísborg, sum var byrjanin til eitt rættiligt ævintýr í føroysku fiskiskapssøguni. Fyrst veiddi teir hemara við línu. Síðan var skipið umbygt til nótaveiðu, og tað er her ævintýrið byrjar.

## Sámal gjørdist ímyndin av Norðborg

Síðan fekk p/f Hvalnes sær Norðborg, var upprunaliga bygdur í 1967 sum Norðbúgvin. Tað vóru Tummas Ørv við fleiri, sum bygdu hetta skip sum línuskip, eftir at Ásur var koppaður á nótaveiði í 1966. Norðborð var umbygdur til nótaskip og fór í vinnu í 1972.

Her gjørdist Sámal skipari, og tað má sigast, at tað man vera fáur skipari, sum saman við síni manning, hevur ført so stóran fong til lands sum Sámal. Tað kundi verið stuttligt at talt fiskarnar og tonsini saman! Víst skal ikki takast nakað frá Eileri sum "sildakongi", men Sámal helt nógv longri á sum fiskimaður. Og tað vísti seg, at uttan mun til hvussu tað gekk hjá øðrum, so kundu Sámal "skapa" fisk. Hann hevði eini serlig evni at leita stimarnar upp og at fáa teir innanborða. Hetta var ikki minst fyri makrel, har hann kundu fylla skipið ferð eftir ferð, meðan hinir vóru sørir.

Norðborg landaði fyrstu ferð 28. og 29. juli 1972. Nøgdin sæst ikki á avrokningini, men virðið var kr. 65.163. Aðru ferð varð avreidd tann 8. august, 30 t. av makreli og matsild fyri kr. 47.251 og 3. ferð varð avreitt tann 16. august 61 t. av makreli fyri kr. 87.000. Fyrstu avrokningarnar vóru fyri hesar avreiðingar og manningarparturin var kr. 3.107,19, og tað var ikki so heilt galið. Men seinni gjørdust avrokningarnar munandi størri.

Í aðrar mátar hevur eisini gingist væl. Norðborg hevur ikki verið tarnað av skaðum og óhappum. Spurdi Sámal um teir ongantíð høvdu siglt á land øll hesi árini. Jú, tað var hent eina ferð, meðan skiparin lá í tryggum svøvni. Tað vóru heilir tveir norskir loðsar á brúnni!

## Sum ein familja

Men tað sum telur meira eru persónligu eginleikarnir hjá Sámali. Hansara fremsta eyðkenni er hansara róliga og álitisvekjandi lyndi. Hann ger ikki nógv um seg, men fólkið umborð treivst so sera væl. Menn siglu við honum í ártíggir, og sum frá leið mundi manningin á Norðborg hava hægsta miðalaldur í flotanum! Menninir umborð kendu seg sum ein familja, og hetta var ikki minst takkað verið Sámal, hvørs eyðkenni eisini er trúfesti. Hann gloymir ikki sínar gomlu felagar. Sámal fær eisini besta ummæli av starvsfeløgum. Prátaði við Henrik Old nú um dagarnar. Tá fortaldi hann, hvussu Sámal hevði bjargað honum fyrsta túrin sum skipara við Nýborg. Tað manglaði ein deilur til asdikkið, so teir fingu ikki roynt. Hann gramdi seg fyri Sámal, sum fegin vildi læna honum ein deil frá teimum. Hetta eydnaðist so sera væl. Teir fingu uppí fyrsta kastið, og Henrik tekur til, at eingin var so forliptur sum Sámal sjálvur um, at tað gekk so væl.

Tá ið Norðborg varð seld til Klaksvíkar fyri nøkrum árum síðani, legðist Sámal uppi. Og tað kundi hann gera við góðari samvitsku, tí hann hevði sanniliga tænt sína verjuskyldu fyri føroyska samfelagið. Hann má roknast sum ein av veruligu slóðbrótarunum, tá talan er um uppisjóvarifiskiskap, sum seinastu árini hevur givið so nógv av sær til samfelagið.

Sámal er giftur við Ragnu, dóttir Elspu f. Wolles, ættað av Trøllanesi og Dánjal á Dul, sum í nógv ár var lærari á sjómansskúlanum. Ragna hevur verið honum ein góð kona og hevur verið ein av teimum mongu fiskimannakonunum, sum hava lagt rygg til í okkara samfelag.

Tey bæði fingu tríggjar døtur, Helena, Elspa og Sólvá.

Ynskt verður Sámali hjartaliga tillukku við teimum 75 árunum.

**ó.**



*Blað nr. 300 Sámal dugdi eisini annað enn at vera skipari. Her bakar hann pannukøkur og vendir teimum í luftini!*



*Manningin á Norðborg í gullbrúdleypi hjá Margit og Nikkel Nielsen av Eiði. Hann var 19 ár við Norðborg, og hann setur Sámal sera høgt. Her síggja vit frá høgru: Jeffri Justinussen, Havn, Helgi Wolles, Klaksvík, Nikkel Nielsen, Eiði, Rólvur Sivertsen, Norðdepil, Sámal sjálvur, John Simonsen, Klaksvík, Poul Jóhannes Andreassen, Haldarsvík og Jógvan á Dul, Havn*